# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI LISTASAVN FØROYA

SB_Tórshavn_Listasavn_2023_1_2024

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta skjali 1, partur av matr. nr. 1265u og 1265v, Tórshavn, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa økið til listasavn, samsvarandi skjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í D1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlað almenningi, náttúrufriðingar- og mentunarligum endamálum og tílíkum.

Stk. 3. Sambært kap. IV, § 23, stk. 2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri D1 øki, at bygging einans verður loyvd sambært serstakari byggisamtykt.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

Stk. 5. Talan er um skógfriðað øki. Bygging má einans fara fram eftir loyvi er fingið frá friðingarnevndini, samanber løgtingslóg um náttúrufriðing frá 9. juli 1970 §2, stk. 2.

## §3. NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKJUNUM

Stk. 1. Økið verður lagt til listasavn og tænastuvirki, ið hava samband við hetta.

Stk. 2. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,45.

Stk. 3. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,50.

Stk. 4. Mest loyvda hædd er 10 m frá planering.

## §4. PARKERING

Stk. 1. Parkeringspláss verða skipaði sum partur av eini heildarloysn fyri ítróttar- og mentunarøkið í Gundadali.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifulltrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

Stk. 3. Útsjóndin á bygninginum skal vera í trá við byggingina, ið sýnd er á viðhefta skjali 3.

## §6. BYGGINMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk,

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Listasavn Føroya | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1.000 | | | | |
| **Dagur** | 03.05.2023 | **Journal** | 23/01717 | **Tekna** | RVH |



| | |
|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna** | **Býarskipanardeildin** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Listasavn Føroya | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 2 | | | | |
| **Mát** | Ikki mátfast | | | | |
| **Dagur** | 03.05.2023 | **Journal** | 23/01717 | **Tekna** | |



**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Listasavn Føroya | | | | |
| **Undirheiti** | Skjal 3 | | | | |
| **Mát** | Ikki mátfast | | | | |
| **Dagur** | 03.05.2023 | **Journal** | 23/01717 | **Tekna** | |